# René Dif við í Ársins Songrødd

Sangarin í Aqua kom púra óvæntað á pallin, tá ið triðja innleiðandi umfarið av Ársins Songrødd var í Havn leygarkvøldið.

Tey sum vóru í Badmintonhøllini leygarkvøldið vóru ikki sørt bilsin, tá ið tey knappliga sóu at AQUA- sangaran Rene Dif kom inn á pallin.

Hann gav okkurt tekin til plátuvendaran Pætur Magnussen, sum beinanvegin fangaði, hvat var á vási, og til frøi fyri áskoðrarnar undirhildu teir báðir við kynstum sínum.

Rene Dif má sigast at vera ein sera dúgligur rappari, og tað eru kanska ikki øll sum vita, at hann var DJ í nógv ár, áðrenn hann gjørdist kendur í pop-bólkinum AQUA.

### Bólkur til finaluna

Birita Bisp & Co. blivu nummar 1 í hesum triðja umfarinum í Songrøddini. Á øðrum plássi varð Bára Svabo Samuelsen. Tey hava sostatt tryggjað sær eitt finalupláss hvør, tá ið finalan verður í Badmintonhøllini tann 5.juni.



*René Dif, sum var ein av limunum í heimskenda danska bólkinum Aqua, er her á pallinum til Ársins Songrødd*

Tá hava fyrireikararnir tryggja sær, at bólkurin Páll Finnur Páll fer at spæla. Bólkurin hevur ikki spælt so nógv seinastu vikurnar, men teir eru tó at hoyra á útvarpsrásunum, og til finaluna í songrøddin fara teir so at spæla aftur.

Fjórða og næstseinasta innleiðandi umfarið í Ársins Songrødd verður í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið tann 15.mai.

# Uttanríkis- og verjupolitikkur

TINGHELLAN/KLUMMAN

*Finnbogi Ísakson*



Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum viðger í hesum døgum eitt uppskot frá Landsstýrinum um trygdarpolitikk Føroya. Hesi seinastu árini hava landsstýrini í Føroyum og Grønlandi lagt meir og meir dent á, at tey vilja hava størri ávirkan á uttanríkis- og verjupolitikkin.

Tað er hugsandi, at landsstýrini kunna fáa nakað víðari heimildir í uttanríkispolitikkinum, tó neyvan í øðrum førum enn tá talan er um mál, sum einans viðkoma Føroyum ella Grønlandi. At hetta ber til er ikki nakað nýtt. Tey seinastu meira enn 30 árini hevur føroyska landsstýrið reelt ført samráðingar uttan beinleiðis danska luttøku við onnur lond um fiskiveiðuavtalur. Møguliga kann praksis víðkast nakað.

Uttanríkispolitikkur er torførur at reka - kanska tann torførasti parturin av politiskum virksemi yvirhøvur. Ein upplæring av fólki til at røkja eina føroyska uttanríkistænastu hevði verið ynskilig. Vit hava sum er umboðsmann í London og Brüssel, men mær tykir, at tørvur er á einari fastlagdari ætlan á økinum. Tað fekk stóran týdning fyri íslendingar, at teir, tá teir fingu ta sokallaðu Sambandslógina í 1918, fingu fólk í donsku uttanríkistænastuna, har tey vórðu lærd at røkja uttanríkispolitikkin. Tann lærdómurin, sum ein dugnalig donsk uttanríkistænasta gav teimum, er komin væl við, síðani Tjóðveldið Ísland varð stovnað í 1944.

Bæði undanfarna og núverandi samgonga settu sær fyri at vera meira við í uttanríkis- og verjumálum. Í samgonguskjalinum frá 2002 stóð:

*"Samgongan hevur sum mál at vinna Føroyum veruliga uttanríkispolitiska ávirkan og at fyrireika egnan uttanríkispolitikk.*

*Føroyskir myndugleikar skulu eftir greiðum reglum tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føroyingar."*

Í samgonguskjalinum, sum Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin skrivaðu undir í januar, stendur:

*"Vit skulu hava størri ávirkan á uttanríkispolitiska økinum. Hetta skal gerast í avtalu við danskar myndugleikar.*

*Føroyskir myndugleikar skulu tryggja sær innlit í og ávirkan/avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið hava týdning fyri Føroyar. Samráðingar verða tiknar upp við donsku stjórnina um at lógartryggja hetta."*

Nakað av muni er á orðingunum, men ikki tann heilt stóri. Tað sæst tó, at heimastýrisflokkarnir Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava sett síni merki á orðingarnar, sum í tveimum førum eru heldur linari enn hjá undanfarnu samgongu. Tær linaru orðingarnar eru *"Hetta skal gerast í avtalu við danskar myndugleikar"* og *"Samráðingar verða tiknar upp við donsku stjórnina um at lógartryggja hetta."*

Her verður sligið fast, at ongin konfrontasjón skal vera við donsku stjórnina um ávirkan á uttanríkis- og verjupolitikk (undrist annars eitt sindur á orðalagið *"við donsku stjórnina",* tí eg helt, at hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum er bara ein stjórn í ríkinum).

Tað avgerandi er, at hvørki tann fyrra ella tann seinna orðingin hevði kunnað útvegað okkum veruliga *ávirkan* á verjumál. Tí er spurningurin, um Løgtingið skal lata frá sær møguleikan fyri at vísa sína støðu, afturfyri at landsstýrið skal fáa eitt sindur meira innlit (tí talan kann ikki vera um ávirkan), sum danska stjórnin vil geva. Løgtingið hevur higartil havt møguleika fyri at vísa sína støðu. Tað er gjørt við samtyktum í hernaðarmálum líka síðani 1940. Síðani eru fleiri aðrar samtyktir gjørdar.

Sum nevnt liggur eitt uppskot frá Landsstýrinum í Tinginum um trygdarpolitikk Føroya. Tann avgerandi setningurin í uppskotinum er, at ***"Løgtingið tekur undir við, at Landsstýrið tekur neyðug stig til tess at røkja trygdarpolitisku, heruppií verjupolitisku, áhugamál Føroya".***

Við øðrum orðum: hereftir verður tað Landsstýrið og ikki Løgtingið, sum tekur avgerð um okkara trygdar- og verjupolitikk.

Tað er ikki nøkur smávegis broyting. Lítil uggi er í, at sambært uppskotinum skal Landsstýrið samskifta við *"Uttanlandsnevnd Løgtingsnevnd í týdningarmiklum málum hesum viðvíkjandi"*. Tað verður so Landsstýrið, sum ger av, hvørji verjupolitisk mál eru týdningarmikil.

Royndirnar av tí eru ikki góðar. Bæði Kristian Djurhuus løgmaður og Petur Mohr Dam løgmaður fingu at vita um tær ætlaðu hernaðarútbyggingarnar um tíggju ára skiftið 1950/60, men hvørgin kunnaði Løgtingið um nakað. Í seinnu helvt av sjeytiárunum fekk Atli P. Dam at vita frá ovastanum í Mjørkadali, at Loranstøðin á Eiði vegleiddi amerikanskar Polaris-kavbátar við kjarnorkuløðingum, men heldur ikki hann helt tað vera neyðugt at kunna Løgtingið, í hvussu so er ikki formliga.

So kann sjálvandi spyrjast, um tað hevur nakran týdning, at Løgtingið ger samtyktir um hernaðarmál. Eg haldi ja. Samtyktirnar hava ikki havt við sær, at støðirnar eru niðurlagdar, men eg ivist ikki í, at tær hava virkað darvandi, tá talan hevur verið um víðari hernaðarútbygging. Hevði Løgtingið ikki havt so greiða støðu, hevði Skálafjørðurin kanska langt síðani verið avbyrgdur sum herskipahavn. Bara fyri at gita eitt dømi.

Støðan hjá okkum føroyingum í verjumálum verður veikari, tá tað bara verður Landsstýrið - ella reelt løgmaður - sum skal taka støðu. Eg haldi ikki, at størri kunning frá einum donskum forsætisráðharra ella verjumálaráðharra hevur størri týdning, enn møguleikin hjá Løgtinginum at hava og taka eina støðu.

Frægast høvdu vit helst fingið burturúr, um bæði samgonga og andstøða høvdu lagt størri dent á at fáa víðari heimildir á uttanríkispolitiska økinum. So leingi vit eru partur av ríkinum verða allar avgerðir í verjumálum tiknar í samráðingum millum stjórnina og fremmandar maktir. Í tí førinum er ivaleyst líka frægt eisini frameftir at lata Løgtingið taka støðu í verjupolitiskum málum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Oljuprísurin togar í 40 dollarar



*Oljufeløgini og oljulondini forvinna nógvar pengar burtur úr tí høga oljuprísinum. Her liggur eitt tangaskip uttan fyri oljuhavnina í Murmansk í Russlandi*

*Mynd: Reuters*

**Í USA hevur oljuprísurin ikki verið so høgur síðani Flógvakríggið í 1991, og altjóða orkustovnurin ávarar um álvarsamar avleiðingar, fellur prísurin ikki**

OLJUPRÍSUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er tann ótrygga støðan í økinum við Persaflógvan og smáar amerikanskar goymslur, sum hava skrúvað oljuprísin upp ígjøgnum. Álopið á oljuútbúnaðin í einari oljuhavn í Saudi-arabia seinasta vikuskiftið hevur elvt tilstúran fyri, at fleiri tílík álop kunnu koma, og tað hevur fingið fleiri at ivast í, hvussu trygg oljuveitingin úr økinum við Persaflógvan er.

Í gjár kom prísurin upp í 39,57 dollarar á amerikanska marknaðinum. og í London fór Brent-oljan fyri 36,80 dollarar fyri tunnuna. Tað merkir, at hesa vikuna er oljuprísurin hækkaður seks prosent.

Tá amerikanarar gjørdu seg til at leypa á Irak í fjør, kom oljuprísurin upp í 39,99 dollarar, áðrenn hann fall aftur, men nú verður roknað við, at hann fer upp um 40 dollarar. Japanski serfrøðingurin Tetsu Emori segði við Reuters í gjár, at hann væntar, at prísurin fer upp um 43 dollarar fyri tunnuna í summar.

Altjóða orkustovnurin IAEA ávaraði mikudagin um, at tann høgi oljuprísurin kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri tey londini, sum noyðast at innflyta olju, men at príshækkingin eisini kann ávirka heimsbúskapin sum heild.

Tann høgi prísurin kemur oljufeløgunum væl við. Norska Statoil kundi mikudagin vísa á sítt besta ársfjórðingsúrslit nakrantíð, og sama dag hækkaðu partabrøvini í A.P. Møller munandi á partabrævamarknaðinum í Keypmannahavn.

# Fasta sambandið dregur

**Eitt av endamálunum við fasta sambandinum um Oyrasund var at fáa stórar altjóða fyritøkur at seta seg niður har. Tað hevur eydnast so mikið væl, at í dag hava 26 av heimsins størstu fyritøkum skrivstovu í økinum**

FAST SAMBAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað eru ikki bara danir og sviar, sum halda seg fáa gagn av brúgvasambandinum um Oyrasund. Longu tá sambandið bleiv fyrireikað, varð tosað um, at tað mundi fara at fáa fremmandar fyritøkur at seta seg niður við sundið, og hendan metingin hevur hildið.

Ein kanning, sum tann óhefti Oyrasundsstovnurin í Malmø hevur gjørt, vísir, at í dag hava 26 av teimum størstu fyritøkunum í heiminum skrivstovu í økinum. Hetta eru í flestu førum skrivstovur, sum umsita tað norðurlendska virksemið hjá teimum einstøku fyritøkunum. Fyri sjey árum síðani høvdu bara tólv altjóða fyritøkur skrivstovu í Keypmannahavn ella í Malmø.

Kanningin vísir eisini, at tá tær stóru altjóða fyritøkurnar fáa sær skrivstovu í Norðurlondum, eru Noreg og Finnland úti í kuldanum. Av teimum hundrað størstu fyritøkunum hava 65 skrivstovu í Norðurlondum. Av teimum húsast 26 í Oyrasundsøkinum, 27 eru í Stockhólmi, og hinar tólv eru aðrastaðni í Danmark ella Svøríki. Tað eru serliga matvøru- og bilfyritøkur, sum trívast væl í Oyrasundsøkinum. Ímillum matvørufyritøkurnar eru kend nøvn so sum Nestlé, Gilette og Coca-Cola, og ímillum bilfyritøkurnar eru eitt nú Peogeot, Toyota og Daimler-Chrysler.

At Oyrasundsøkið hevur so stóran týdning kemst av, at tað liggur mitt í tí stóra svenska-danska marknaðinum, og formaðurin í Oyrasundsstovninum, Anders Olshov, ivast ikki í, at tær stóru fyritøkurnar síggja fleiri fyrimunir í at seta seg niður har. Eitt nú uppfata nógvar teirra Norðurlond sum ein marknað, og í so máta liggur Oyrasundsøkið væl fyri, sigur hann.

Christian Wickmmann Hansen, sum er professari í landafrøði, sigur við Aftenposten, at tað fasta sambandið um Ouyrasund hevur virkað sum ein magnet og hevur drigið stórfyritøkurnar til sín, og at alt fleiri fyritøkur síggja tað sum ein stóran fyrimun at hava eina deild í økinum við Keypmannahavn, Malmø og Lund sum marknaði.

Tað fasta sambandið um Oyrasund varð tikið í nýtslu tann 1. juli í 2000. Í økinum við brúnna búgva 3,5 milliónir fólk, og har eru umleið 170.000 fyritøkur.

## Nærkast friði

Nú er líkt til, at endi kann fáast á borgarakrígnum í Sudan, sum hevur vart í 21 ár, og sum hevur kostað umleið hálvaaðru millión mannalív.

Seinastu dagarnar hava umboð fyri sudansku stjórnina og uppreistrarfelagsskapin SPLA verið til samráðingar í grannalandinum Kenya, og nú tykist ein loysn vera fyri framman. SPLA umboðar tann kristna meirilutan har suðuri í landinum, sum vil hava sjálvsstýri, og nú er tann muslimska stjórnin í Khartoum gingin við til at lata fólkið í Suðursudan velja ímillum størri sjálvræði og fullkomna loysing. Samstundis er avtalað, at sudanska lóggávan framvegis skal byggja á muslimskar siðir, men tann tiltikna sharia-revsilógin skal tó ikki galda tey kristnu har suðuri í landinum.

Avtalan ber í sær, at verandi forsetin, Omar al-Bashir, heldur fram í embætinum. Nýggjur varaforseti verður tann kristni uppreistrarleiðarin John Garang. Teir báðir hava fyrr avtalað, hvussu oljuríkidømið í Sudan skal býtast ímillum tann kristna og tann muslimska partin av landinum.

## Oljuprísur og ferðaseðlar

Fleiri av teimum stóru flogfeløgunum eru í stórum fíggjarligum trupulleikum, og tann høgi oljuprísurin kann fara at gera enda á summum feløgum.

Bretska British Airways, sum er heimsins størsta flogfelag, skal ætlandi gjalda tíggju milliardir krónur fyri brennievni í ár, og tað er hálvonnur milliard meiri enn í fjør. Fíggjarstjórin í felagnum, John Roshton, sigur við BA News, at felagið noyðist at skarva av øðrum útreiðslum. Tann høgi oljuprísurin kostar amerikonsku American Airlines og Unites Airlines tvær milliardir krónur eyka í ár. Støðan er serliga álvarssom hjá American Airlines, sum stríðist fyri at sleppa undan at fara á húsagang. Continental Airlines, sum eisini er amerikanskt, hevði 700 milliónir krónur í halli í januar ársfjórðingi orsakað av tí hækkaða oljuprísinum.

Tey stóru flogfeløgini hava harða kapping frá lágprísfeløgunum, men tann høgi oljuprísurin kostar eisini hesum feløgunum nógv. Tí er tað bara ein spurningur um tíð, til lágprísfeløgini verða noydd at seta prísirnar upp, skrivar Berlingske Tidende.

## Svenska stjórnin umrøður ódjór

Svenska stjórnin skal nú taka støðu til, um ein maður skal fáa loyvi at taka egg frá einum ódjóri, sum sigst halda til í einum av teimum stóru svensku vøtnunum.

Djórið, sum er ein sokallaður sjóormur, sigst halda til í vatninum Storsjøn. Hann er 14 metrar langur og sigst hava verið í vatninum seinastu 400 árini. Hann hevur ofta verið umrøddur, eisini í nýggjari tíð, men tað eru fá, sum siga seg hava sæð hann. Í 1962 gjørdi eitt djóraverndarfelag av, at sjóormurin skuldi friðast, og hevur tóku teir lokalu myndugleikarnir undir við í 1986.

Men nú hevur Magnus Cedergren í Stockholm søkt myndugleikarnar um at sleppa at royna at taka egg frá sjóorminum. Teir lokalu myndugleikarnir í Jæmtlandi hava sagt nei, men umsøkjarin hevur nú sent stjórnini í Stockholm málið. Har er tað løgmálaráðið, sum skal taka støðu til umsóknina, men roknað verður við, at myndugleikarnir fara at kanna málið væl og virðiliga, áðrenn Magnus Cedergren fær svar.

## Skjót samrøða

At BMW-bilar kunnu koyra skjótt, munnu tey flestu vita, men tað er ikki altíð so skilagott at trýsta ov fast á speedaran, tá ein situr við róðrið í einum BMW.

Tað mátti ein skoti sanna nú um dagarnar. Hann var farin ein túr við sínum BMW Z4, men var so óheppin at koma fyri eitt av mátingartólunum hjá løgregluni. Tað vísti, at maðurin koyrdi 250 kilometrar um tíman, og at hann harafturat sat og tosaði í fartelefon.

Skotska løgreglan tók sum vera man mannin, men einki verður sagt um, hvørja revsing hann fekk. Blaðið Daily Mirror veita at siga frá løgregluni, at maðurin setti næstan nýtt met á bretsku vegunum. Metið, sum varð sett fyri einum ári síðani, er 252 kilometrar um tíman, og tað bleiv sett á sama vegateininum. Vit kunnu skoyta uppí, at tann bilførarin koyrdi eisini í einum BMW-bili.